# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# BUSINESS AS USUAL

Soleiðis skírir løgmaður, Kaj Leo Johannesen, støðuna, sum var í løgtinginum seinasta leygarmorgun, tá fleiri mál vórðu skundað ígjøgnum løgtingið, sum skal í summarfrí í 11 vikur.

Løgmaður er lagdur undir at sita við valdið við tí einfalda endamáli – at hann vil so fegin sita við valdið. Tað er eitt kent fyribrigdi, at politikarar klistra seg so fastar at valdinum, og tí er tað eisini lætt at kasta løgmanni slíkt fyri í hesum døgum, tá eingin annar enn hann sjálvur tykist førur fyri at fáa hann frá valdinum. Men hesum avvísir løgmaður sum vera man. Hann vísir hinvegin á, at vit hava nýggjar tíðir – at vit hava sett skjøtil á eina broytingartíð í føroyskum politikki, har einstakir tinglimir ikki longur kunnu blokera mál og hóreiggja sær, sum teimum lystir.

Vit hava víst á tað áhugaverda við dagsins politikki – ikki bara hjá minnilutasamgonguni, men hjá teimum skiftandi meirilutunum, sum vísa seg í tinginum – at tað nú brádliga ber til at viðgera eym mál, sum ávísir minnilutar hava blokerað. Og tá løgmaður sigur, at fólk eru troytt av, at minnilutar seta alt í veð – bæði samgongu og flokk – fyri at steðga málum, tey persónliga ikki kunnu taka undir við, so kunnu vit ikki verða annað enn samd í, at hetta hevur verið til stóran ampa fyri politiska arbeiðið og hevur tarnað neyðugum reformum og broytingum.

Løgmaður vísir eisini á, at tað eru hesir somu blokerandi minnilutarnir, sum nú hava hug at ressast við, nu teir merkja, at politiska gongdin gongur teimum ímóti.

Jú, tað er áhugavert at fylgja dagsins politikki. Ikki minst tí, at arbeitt verður tvørtur um samgongu- og andstøðumørk. Tað sæst við makrelsamgonguni millum Tjóðveldi og samgonguna, og tað sæst í »øl- og brennivínssamgonguni«, sum samtykti søguliga broyting í rúsdrekkalógini.

Men eru nýggir tónar at hóma í politiska arbeiðinum millum flokkarnar á tingi, so eru eisini nýggir



tónar hoyra eitt nú innanfloks í Tjóðveldinum í hesum døgum, nú ósemja er millum limir floksins í stjórnarskipanarnevndini, Høgna Hoydal og Sjúrð Skaale. Orð sum »lygn« og »ósannindi« verða brúkt, hóast miðlarnir sum ikki einaferð fáa skotið í skógvarnar at leggja monnum orð í munnin. Vit fáa at síggja, hvussu leikur fer í hesi orrustu.

Men broytingar eru: Blokerandi minnilutar missa vald, skiftandi meirilutar gera søguligar semju, innanhýsis stríð um loysing – og ein fegin løgmaður, sum kann taka undir við næstan øllum.

Jú, business as usual, hví ikki tað?

## Løgmaður: Blokerandi minnilutar ressast tí teir missa vald

# Føroyaprent grøna gávu frá Etika

Føroyaprent hevur fingið eitt ordans herðaklapp, við »grønu gávuni« á heilar 42.320 kr frá Etika. Hetta hendi á ráðstevnu í Norðurlandahúsinum 13. mai, í samband við umhvørvisvikuna sum Tórshavnar Kommuna skipar fyri.

Dómsnevndin er mannað við umboðum frá Agenda 21 stovuni, Tórshavnar kommunu og Umhvørvisstovuni, og Føroyaprent fær hendan stóra heiður, fyri at:

***brúka umhvørvisrætt pappír***
***brúka vegetabilskar prentlitir***
***endurnýta prentlutir***
***minimera pappírsspill***
***og burturkast***
***spara um orkunýtsluna og at brúka sum mest varandi orku***
***hava atlit til evnafrøði í arbeiðsumhvørvinum***
***planta trø í Føroyum***




*Elin Lindenskov, forkvinna í heilsu- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar kommunu, Hansina Dahl, marknaðarleiðari á Føroyaprenti og Winnie Simonsen, leiðari á Etika*

Føroyaprent er einasta fyritøka í Føroyum, sum er Svanamerkt, og er umhvørvisleiðsla hjá teimum merkt av krøvum til góðkenningina. - Í apríl í ár fóru vit undir at planta trø við viðarlundina í Kerjum uppi við Hotel Føroyar. Hetta er eitt skógarfriðað økið, einar 3.650 m2 til støddar, har pláss er til eini 1.500 – 2.000 trø. Seinni í ár fara vit at planta trø á øðrum økjum runt landi. Dómsnevndin legði í avgerð dent á hesa verkætlanina hjá Føroyaprent, og takkaði Føroyaprenti fyri plantingarátakið, sigur Føroyarprent.

Etika hevur gjørt av at taka 20 krónur fyri eina kannu av kranavatni. Allur peningurin frá sølu av vatni fer óskerdur í ein umhvørvisgrunn, og verður hesin peningur á hvørjum ári latin til eitt framskygt náttúru- og umhvørvisendamál.

- Vit á Føroyaprent eru takksom og fegin um at tað í ár er Føroyaprent, sum fær heiðurin. Virðislønin frá Etika fer heilt víst at síggjast aftur í náttúruni, til stóra gleði hjá okkum øllum, sigur Føroyaprent.



## Sjálvandi eru minnilutar misnøgdir

KAJ LEO JOHANNESEN
KJAK Á SÍÐU 11



## Stjórnarskipan ella undirskipan?

HØGNI HOYDAL
KJAK Á SÍÐU 13

# Løgtingið verður kallað samanaftur

Longu í komandi viku verður løgtingið eftir øllum at døma kallað samanaftur, hóast fundurin seinasta leygarmorgun skuldi vera tann seinasti.

Hergeir Nielsen, løgtingsformaður, sigur í gerðabókini, tá tingfundin endaði klokkan hálvgum trý leygarnáttina, at ætlanin var at hetta skuldi verða seinasti fundur í hesi tingsetuni.

Formaðurin plagar tá at siga, at um ikki okkurt serligt tekur seg upp, so kemur tingið saman aftur á ólavsøku.

– Í ár er tað tó soleiðis, at vit vita, at nøkur mál eru eftir at avgreiða, og tá hesi eru klár



væntandi um eina góða viku, verður Løgtingið kallað til fundar, sigur Hergeir Nielsen.

# Tjóðveldismenn í opnum stríði

Nú er aftur galið millum Høgna Hoydal, formann í Tjóðveldinum, og Sjúrð Skaale, tingmann fyri Tjóðveldi.

Málið snýr seg um ósemjuna í stjórnarskipanarnevndini – men tað sum eyðkennir stríðið er, at tosað verður um »hálvar lygnir og hálva sannleikar«. Sjúrður Skaale skrivaði herfyri á Facebook, at Høgni Hoydal leyg, men í Dimmalætting í síðstu viku bað hann um umbering fyri at brúka vendingina »óluksáliga frekt« – nú tosar hann um »hálvar lygnir«.

Eyðsæð er í øllum førum, at opið stríð er innanveggja í Tjóðveldinum, tá báðir partar velja at fara í bløðini við ósemjuni.

Greinarnar hjá Høgna Hoydal og Sjúrði Skaal kunnu lesast á síðu 11 og 13.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*